**Býráðsfundur hósdagin 31. januar 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **12/00403**<br>**Vegarbeiði undir Gøtueiði, kloakk- og vatnleiðingar v.m.**<br>Landsverk arbeiðir við at breiðka vegin undir Gøtueiði og er ynski um, at fáa kommununa at leggja kloakk- og vatnleiðingar, brandpost í vegin áðrenn asfalterað verður.<br><br>Tað er eingin játtan til omanfyri nevnda arbeiði, ið verður mett at kosta kr. 450.000,00 uttan mvg. Hetta er samstundis ein partur av spillvatnsætlanini sum er góðkend av Umhvørvisstovuni.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at bjóða arbeiði við kloakk- og vatnleiðing út.<br><br>Eingin peningur er avsettur á fíggjarætlanini fyri 2013 til arbeiðið, og mælir byggi- og býarskipanarnevndin at peningur verðar játtaður til arbeiðið.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Harumframt mælir fíggjarnevndin til, at vegurin Eiðisbrekka/Marknavegur verður asfalteraður hetta kostar uml. 100.000,00 kr. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini. |
| 2. | **12/00317**<br>**Umsókn frá Svimjifelagunum Reysti, um fíggjarligan stuðul**<br>Trivnaðarnevndin umrøddi málið á fundi, 5. desember 2012 mælt til at komandi býráð skal taka endaliga støðu til málið.<br><br>Mentanarnevndin mælir til, at Svimjifelagið Reysti fær útgoldið í 2013 tað, sum er sett av á fíggjarætlanini 2013. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510 – 20 “*stuðul til ítrótt*”<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at játtað stuðul á kr. 60.000,00 og at peningurin verður tikin av konto | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur hósdagin 31. januar 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

5.24.14.510 – 20 "*stuðul til ítrótt*".

**3. 12/00344**

**Umsókn frá G! um fíggjarligan stuðul**

Trivnaðarnevndin umrøddi málið á fundi, 05. desember 2012 mælt til at komandi býráð skal taka endaliga støðu til málið.

Mentanarnevndin mælir til, at G! fær útgoldið í 2013 tað, sum er sett av á fíggjarætlanini 2013. Peningur verður tikin av konto 5.24.13.510 – 30 "*ymisk mentanartiltøk*"

Fíggjarnevndin mælir til at játtað stuðul á kr. 200.000,00 og at peningurin verður tikin av konto 5.24.13.510 – 30 "*ymisk mentanartiltøk*"

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Oluffa Joensen var úti undir viðgerðin vegna ógegni.*

**4. 12/00387**

**Umsókn frá Víkingi, um fíggjarligan stuðul**

Trivnaðarnevndin umrøddi málið á fundi, 05. desember 2012 mælt til at komandi býráð skal taka endaliga støðu til málið.

Mentanarnevndin mælir til, at Víkingur fær útgoldið í 2013 tað, sum er sett av á fíggjarætlanini 2013. Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510 – 20 "*stuðul til ítrótt*"

Fíggjarnevndin mælir til at játtað stuðul á kr. 500.000,00 og at peningur verður tikin av konto 5.24.14.510 – 20 "*stuðul til ítrótt*"

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Brandur Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanus Jacobsen og Erik Lervig vóru úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**5. 12/00064**

**Áheitan um keyp av plantuøki á matr. nr. 114a í Syðrugøtu**

Festarin Jákup Øre hevur heitt á Eysturkommunu um at keypa uml. 2.500 m$^2$ av jørð sum verður nýtt til plantuøki.

Eysturkommunu býráð samtykti á býráðsfundi tann 25. juni 2012 at bjóða festaranum at keypa økið

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 31. januar 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

fyri 15% av dagsprísi fyri hagajørð, sum svarar til 10,65 $m^2$.

Síðani er komið fram at Eysturkommuna ikki kann keypa jørðina frá festaranum men frá búnaðarstovuni. Búnaðarstovan hevur boðað frá at Eysturkommuna kann keypa jørðina fyri 89,00 kr. $m^2$

Fíggjarnevndin mælir til at halda fast við avgerðina hjá býráðnum tann 25. juni 2012.

**6.** **10/00313**

**Bussleið í Eysturkommunu**

Sáttmálin við AP-bussar er útgingin tann 31. desember 2012, og tískil er neyðugt at endurnýggja verandi sáttmála ella t ger ein nýggjan. Ap-bussar hevur boðað frá at tey eru áhugaði í at halda fram við busskoyringini, og hevur givið Eysturkommunu tilboð.

Fíggjarnevndin mælir til at leingja verandi sáttmála til 1. juni 2013.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**7.** **12/00286**

**Støðutakan til hvat skal gerast við GÍ-húsið**

Í desembur 2012 bleiv semja gjørd millum Trygd og Eysturkommunu um endurgjald fyri GÍ-húsið. Ein treyt í avtaluni er at kommunan innan 1. február 2013 skal boða Trygd frá hvat verður gjørt við húsið

Fíggjarnevndin mælir til at húsið verður niðurtikið.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**8.** **13/00030**

**1.viðgerð av eykajáttan til konto 6.30.41.511 Kloakkir (Løgujáttan)**

Í sambandi við arbeiðið at leggja kloakk v.m undir Gøtueiði **(mál nr. 12/00403)** verður neyðugt við eykajáttan.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á kr. 550.000,00.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 31. januar 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

Peningurin verður tikin av innistandandi

**9. 13/00031**
**Nýggj kommunustýrisskipan.**
Neyðugt verður at broyta verandi kommunustýrisskipan, við tað at frá 1. januar 2013 eru 2 fastar nevndir komnar afturat.

Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**10. 13/00032**
**Val av barnavernd.**

Einmælt samtykt at í barnaverndarnevndina verða vald:

1. Kári Nolsøe Olsen
2. Sólrun Poulsen
3. Súsanna Joensen
4. Elin Mikkelsen
5. Hugo Leo

Varalimir:
1. Hans Mourits Foldbo
2. Tórhild Bjarkhamar
3. Leila Olsen
4. Beinta Joensen
5. Alvi Justinussen

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________

Hanna Jensen ______________________

Hanus Jacobsen ______________________

Emma Rasmussen ______________________

Hjalti Dalheim ______________________

Ólavur Olsen ______________________

Árni Jacobsen ______________________

Oluffa Joensen ______________________

Brandur Jacobsen ______________________

## Býráðsfundur hósdagin 31. januar 2013 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

## Fundurin lokin kl. 21.00